# Høgni vil hava at vita um Føroyar eru eitt amt

**Høgni Hoydal vil hava ríkisumboðskonuna at siga okkum, um danskar ráðstovur rokna Føroyar sum eitt amt, eftir at ein danskur ráðharri, hevur nýtt orðið »bopælsamt« í sambandi við føroyingar**

FYRISPURNINGUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Hví verða Føroyar í svari frá danska innanríkis- og heilsumálaráðharranum til ein fólkatingslim lýstar sum eitt »bopælsamt«?

Hetta vil Høgni Hoydal, løgtingsmaður, hava at vita. Tí hevur hann sett Birgit Kleis, ríkisumboðskonu, ein fyrispurning, sum hon skal svara í løgtinginum.

Høgni Hoydal spyr eisini, um Føroyar á donskum ráðharrastovum verða lýstar og viðgjørdar sum eitt amt í Danmark – eitt nú tá hagtøl og skrásetingar verða viðgjørdar.


*Birgit Kleis, ríkisumboðskvinna skal svara Høgna*

Orsøkin til fyrispurningin er at finna í einum fyrispurningi hjá Naser Khader, fólkatingsmanni hjá Radikala Vinstraflokkinum, sum rættuliga hevur lagt seg út í føroyska kjakið – og ikki minst við fólkatingsumboðið hjá Tjóðveldisflokkinum, sum til í gjár var Tórbjørn Jacobsen.

Høgni Hoydal vísir á, at Naser Khader herfyri setti fram fyrispurning til danska innanríkis- og heilsumálaráðharranum, Lars Løkke Rasmussen, um hagtøl fyri føroyskar kvinnur, ið fremja fosturtøku í Danmark.

Tingmaðurin vísir á, at Lars Løkke Rasmussen í svarinum m. a. sigur, at »En trækning fra Landspatientregistret viser således, at der i den fire-årige periode 1999-2002 kun var én kvinde med bopælsamt på Færøerne, som fik foretaget abort i Danmark.«

Hesi orð eru fallin Høgna Hoydal fyri bróstið.

– Danski ráðharrin lýsir sostatt Føroyar sum eitt »bopælsamt« og vísir til Landspatientregisteret. Hetta tykist margháttligt, tí hóast ósemjur um ríkisrættarligu støðu Føroya, so hava føroyingar flestir helst havt ta fatan, at danskir myndugleikar ikki longur lýsa Føroyar sum eitt amt millum hini í Danmark. Neyvan hevur nakar heldur roknað við, at Føroyar í donskum hagtølum og skrásetingum verða viðgjørdar sum eitt amt, sigur Høgni Hoydal.

Tí spyr hann í fyrsta lagi, hví Føroyar í svarinum frá Lars Løkke Rasmussen verða lýstar sum eitt amt.

Og í øðrum lagi spyr hann, um hetta bert er eitt einstakt dømi, ella um tað er vanligt, at Føroyar verða viðgjørdar sum eitt av donsku amtunum hjá donskum ráðharrastovum og myndugleikum.

– Eg vil t. d. hava at vita, um Føroyar í donskum skrásetingum og hagtølum verða viðgjørdar sum eitt amt og samanbornar við donsku amtini á hesum grundarlagi, sigur Høgni Hoydal.







*Proppurin á glasfløskuni er helst tað merkt sermerkta við nýggja sukurfría sodavatninum frá Føroya Bjór*

# Sqviiz frá Føroya Bjór

**Nýggir proppar og nýtt sukurfrítt sodavatn frá Føroya Bjór**

SODAVATN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Føroya Bjór hevur sent eitt nýtt slag av sodavatni á marknaðin. Tey nevna sodavatnið »Sqviiz«.

Sambært Einar Waag, stjóra á Føroya Bjór, kemur hetta orðið partvís av enska »squeeze«, ið merkir at pressa: »Squeeze a lemon«.

– Hetta hevur tó einki við landsins búskaparstøðu at gera. Hetta er ein appelsinvatn uttan sukur við avbera góðum smakki, sigur hann.

»Sqviiz« fæst í 0,25 litur flødsku við tí nýggja Ring Crown proppinum. Tað er tann proppurin, ið summi kenna frá Tuborg »plokk«, ið er til at toga av – uttan propptrekkjara. »Sqviiz« fæst eisini í 0.5 liturs plastikfløskum.

Á Føroya Bjór vóna tey, at sodavatnið sleppur undan sukuravgjaldinum, sum hevur verið upp á tal.

Sodavatn í glasfløskum er næstan vorðið sum lundi á jólanátt, tí tey allar flestu munnu í dag drekka sodavant av plastikkfløsku.

Á Føroya Bjór leggja tey kanska eitt sindur av nostalgi í tað – aftur at fáa fólk at drekka úr glasfløskum.

Bryggjaríið hevur gjørt íløgu upp á sjey milliónir krónur í nýggja tappimaskinu, sum m. a. eisini hevur møguleika at at gera »Ring Crown« proppar, sum teir kallast.



# FarIce opnar dyrnar fyri breiðbandi

**Við nýggja samskiftiskaðalinum er fløskuhálsurin niður á evropeiska meginlandið burtur, og tí satsar Føroya Tele upp á skjótt og fast internetsamband til føroyingar**

SAMSKIFTI
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Nú FarIce samskiftiskaðalin úr Íslandi yvir Føroyar og niður til Bretland er veruleiki, er Føroya Tele til reiðar at bjóða føroyingum internet breiðband.

Nýggja tilboðið er eitt fast samband til internetið, eitt sonevnt ADSL-samband, ið er munandi skjótari enn uppringda sambandið.

Richard Mortensen, marknaðarstjóri á Føroya Tele, samanber broytingina við ein knorslutan síðuveg, ið verður skiftur út við ein motorveg.

Meðan knorsluti síðuvegurin, gamli Cantat-3 kaðalin, noyddi Føroya Tele at gevast við at selja ADSL-samband til privatkundar, tá teir gjørdust 300 í tali, opnar nýggi FarIce kaðalin dyrnar fyri skjótum internetsambandi til so at siga allar føroyingar.

## Níggju av tíggju

Nú lýsingarherferðin hjá Føroya Tele fer av bakkastokki, hava góð 80 prosent av øllum føroyingum møguleika at taka av tilboðnum.

Í ár verða seks bygdir afturat knýttar í samskiftismotorvegin. Og tá útgerð verður sett upp í tveimum bygdum afturat næsta ár, fara umleið 90 prosent av føroya fólki at hava møguleika fyri skjótum og føstum internetsambandi.

Tað er ein stór íløga fyri Føroya Tele at knýta fleiri bygdir upp í ADSL-sambandið.

– Men hesar útbyggingar verða gjørdar saman við øðrum útbyggingum hjá Føroya Tele, og tí ber illa til at siga, júst hvussu nógv hesin partur fer at kosta, sigur Páll Vesturbúð, tekniskur stjóri hjá Føroya Tele.

Verður gongdin tann sama sum í Danmark, har 12 prosent av fólkinum nú hevur ADSL-samband, so fara umleið 6000 føroyingar at fáa sær breiðband næstu 3-4 árini.

– Heimurin gerst minni og minni, og fólk rokna við at fáa somu tilboð í Føroyum, sum tey fáa aðrastaðni, sigur Richard Mortensen.


*Richard Mortensen, marknaðarstjóri á Føroya Tele, bjóðar føroyingum ADSL-samband, nú FarIce kaðalin er tikin í nýtslu*
*Mynd: Jón Brian Hvidtfeldt*

Føroya Tele hevur, umframt at kaga eftir grannalondum okkara, gjørt egnar kanningar av tørvinum á skjótari og betri internetsambandi, og tær stuðla undir nevndu tøl.

## Minstakrav

Føroya Tele hevur sett 20 milliónir krónur í felagið, sum eigur FarIce kaðalin, umframt at Føroya Tele veðheldur fyri 60 milliónum í sama felag. Og tað verður internetnýtslan hjá føroyingum, sum skal forrenta íløguna.

Men Richard Mortensen vil ikki siga, hvussu nógv ADSL-hald skulu um søludiskarnar hjá Føroya Tele, fyri at íløgan ber seg.

Spurdur, hvørt Føroya Tele roknar við kapping frá øðrum veitarum, og hvussu stóran marknaðarpart almenna partafelagið væntar sær at fáa, sigur Richard Mortensen, at miðað verður ímóti at fáa millum helmingin og 80 prosent av viðskiftafólkunum.

## Nógvir fyrimunir

Samanborið við vanliga, uppringda internetsambandið hevur breiðbandið fleiri fyrimunir. Tað gongur væl skjótari - heilt upp til 20 ferðir skjótari. Brúkarin er altíð á netinum, og skal tí ikki ringja upp hvørja ferð. Íbindingin fer ikki um telefonlinjuna, ið tískil ikki verður blokerað, og harumframt verður ikki goldið eftir tíðini á netinum, men eftir nýtsluni av megabytum.

## Pakkaloysnir

Um fólk ynskja breiðband, so hevur Føroya Tele trý ymisk tilboð. Bíligasta loysnin kostar 280 krónur um mánaðin í haldaragjaldi, og fyri pengarnar fær tú internetsamband við 256 kilobyte ferð. Næsta loysnin kostar 595 krónur um mánaðin í haldaragjaldi, her er ferðin skrúvað upp á 512 kilobyte og harumframt fær tú tvey tey fyrstu gigabytini á internetinum við í prísinum. Triðja loysnin kostar 895 krónur í mánaðargjaldi, ferðin er 1024 kilobyte, og fyrstu trý gigabytini eru við í prísinum.

Fyri allar pakkaloysnir er annars galdandi, at hvørt megabyti, tú togar niður á telduna, kostar 50 oyru.

Umframt nevndu prísir fer tað at kosta 750 krónur í stovningargjaldi at fáa sær breiðband frá Føroya Tele. Eisini skal tú keypa eitt mótald (modem), ið kostar millum 1200 og 1400 krónur, og dugur tú ikki sjálv/-ur at seta leidningin til telduna og fáa sambandið upp at koyra, skal harumframt rindast eitt montørgjald til teknikaran frá Føroya Tele.

Richard Mortensen ásannar, at prísirnir ikki eru á sama lága støði sum eitt nú í Danmark. Men marknaðarstjórin vísir á, at Føroya Tele kann ikki gera tað bíligari í dag.

– Vit meta okkum hava ásett ein prís, ið vit meta fara at halda marknaðar-liga, sigur Richard Mortensen.

### Fakta

**Í hesum plássum ber í dag til at fáa sær breiðband:**
Tórshavn, Argir, Hoyvík, Hvítanes, Kaldbak, Kollafjørður, Vestmanna, Hvalvík, Streymnes, Nesvík, Langasandur, Oyrabakki, Norðskála, Svínáir, Eiði, Skála, Strendur, Rituvík, Toftir, Runavík, Glyvrar, Saltangará, Søldarfjørður, Gøta, Kambsdalur, Fuglafjørður, Klaksvík, Sandavágur, Miðvágur, Trongisvágur, Tvøroyri, Froðba og Vágur

**Seinni í ár fáa hesi pláss møguleikan:**
Hvalba, Skopun, Sandur, Leirvík, Hósvík og Sørvágur.

**Í 2005 fáa hesi pláss møguleikan:**
Norðdepil og Hvannasund

FarIce verkætlanin:

# Samskiftismotorvegurin tikin í nýtslu

**FarIce kaðalin, ið gongur av Seyðisfirði umvegis Føroyar og niður til Skotland, vil nøkta tørvin á internetsambandi í nógv ár frameftir. Størsta løtan var, tá sáttmálin var undirskrivaður 26. november 2002, sigur Suni Joensen, ið seinastu trý árini hevur havt ábyrgdina av føroyska partinum av FarIce**

SAMSKIFTI
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Tá FarIce kaðalin var endaliga tikin í nýtslu var tað samtíðis endin á drúgvum og rúgvusmiklum arbeiði fyri yvir 400 milliónir krónur.

Fyrireikingararbeiðið byrjaði longu í 1999, og síðan var farið undir sonevndar "desktop studies." Tað er at kanna, hvar ein kaðal verður lagdur tryggast og lættast. Hetta er rættuliga umfatandi arbeiði, tí kort av havbotninum skulu kannast. Eisini skuldi kannast, hvussu fiskaríið var í økinum, har kaðalin skuldi leggjast. Hugt varð eftir møguligum lendingarstøðu, og harumframt skuldi kannast, hvussu skjóta internetsambandið kom víðari úr Skotlandi niður á evropeiska meginlandið og út í stóra heim.

Áðrenn kaðalin varð lagdur vóru umfatandi botnkanningar gjørdar, millum annað fyri at vita, hvat slag av botni hann kom at liggja í, og um forðingar vóru á vegnum.

## Spennandi

Ábyrgdin fyri arbeiðinum hevur ligið hjá Suna Joensen, ið seinastu trý árini at kalla burturav hevur arbeitt við FarIce verkætlanini.

Sum partur av einum trímannabólki, umboðandi føroysku og íslendsku eigararnar, umframt ein ráðgeva frá donsku telefyritøkuni TDC, hevur Suni Joensen samskipað nógva og umfatandi arbeiðið.

– Hetta hevur verið sera spennandi, og ein stór avbjóðing. Talan er um eitt nýtt øki við nýggjum teknikki, og eisini er fyrstu ferð, at vit hava nýtt eitt kaðalskip, sigur Suni Joensen.

Hann letur væl at samarbeiðinum við italska Pirelli, sum fekk ábyrgdina av at leggja sjálvan kaðalin. Føroya Tele hevur haft eygleiðarar til undir øllum arbeiðinum, millum annað umborð á kaðalskipinum, og tað hevur betrað samstarvið enn meira.

Eftir at italska kaðalskipið Pertinacia varð liðugt við at pløða kaðalin niður í havbotnin, varð skip sent út til at eftirkanna, at kaðalin ikki stakk burturúr nakrastaðnil.

Hetta arbeið var liðugt í heyst, og 29. november yvirtók FarIce felagið formliga kaðalin. Síðan hava royndarkoyringar verið gjørdar, áðrenn hann hósdagin varð tikin í nýtslu.

Suni Joensen fegnast um, at drúgva arbeiðið nú loksins er liðugt.

– Men størsta løtan var kortini, tá sáttmálin um at fara í gongd var undirskrivaður 26. november 2002, leggur hann afturat.

# FarIce er ein heilsøla

**Hóast Føroya Tele hevur sett 20 milliónir krónur í FarIce verkætlanina og veðheldur fyri 60 milliónum afturat, so fáa kappingarneytarnir somu fortreytir. Tí FarIce er ein heilsøla, har øll mugu keypa fyri sama prís**

SAMSKIFTI
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Umfatandi marknaðarføringin hjá Føroya Tele av nýggjum tilboðum í kjalavørrinum av at FarIce-kaðalin er tikin í nýtslu kann kanska geva eina mynd av, at fyritøkan situr tungt á nýggja samskiftismotorvegnum.

Og myndin gerst kanska sterkari av, at Føroya Tele hevur sett 20 milliónir í partapeningi í felagið, sum eigur og rekur kaðalin, umframt at fyritøkan heftir fyri yvir 60 milliónum krónum av láninum hjá FarIce felagnum.

Men soleiðis er ikki.

Grundtankin við FarIce felagnum er, at tað skal virka og arbeiða sum ein heilsøla. Og tá Føroya Tele skal nýta samskiftismotorvegin, skal fyritøkan keypa tænastuna frá FarIce fyri ein fastan kostnað, ið er tann sami, sum aðrir internetveitarar skulu gjalda.

Størsti kappingarneytin hjá Føroya Tele á internetøkinum, Kall, bjóðar ikki enn ADSL-tænastur, men við Útvarpið hóskvøldið segði Bjarni A. Bjarnason, stjóri, at fyritøkan væntandi fer at bjóða hesar tænastur um eina tíð.

Øll umsiting og søla hjá FarIce felagnum fer fram í Íslandi, men tó skal Føroya Tele røkja umsita samskifti við føroyskar myndugleikar.